

styttri veg til fullkomið úrslit

Lady Once dekkar fyrstu ferð

NÝGGJHEIT Lady Once 4,5 ltr.
Nýggj superdekkandi, kann vaskast og matt máling, ið dekkar fyrstu ferð. Gevur tað besta úrslitið
**Vegl. prísur 699,-**
SPAR 100,-
Vegl. kampagnuprísur NÚ 599,-

Kom inn og fá tað nýggja "Farver & Ideer"

Lady Vegg 10 4,5 ltr.
Frálika gott dekkievni og hefti. Lætt at arbeiða við, tornar skjótt og gevur eitt flott úrslit
**Vegl. prísur 569,-**
SPAR 100,-
Vegl. kampagnuprísur NÚ 469,-

Lady Vegg 25 4,5 ltr.
Frálika gott dekkievni og hefti. Lætt at arbeiða við, tornar skjótt og gevur eitt flott úrslit, sera lætt at vaska
**Vegl. prísur 629,-**
SPAR 100,-
Vegl. kampagnuprísur NÚ 529,-

Konsulenttænasta - ring og fá góð ráð ókeypis

Lady Interiør 1 ltr.
Hálvblonk træ- og jarnmáling, ið gevur flatu, sum um hon var sproytumálað
**Vegl. prísur 229,-**
SPAR 30,-
Vegl. kampagnuprísur NÚ 199,-

Profa heuvr nú eina spennandi nýggjheit til tey, sum hava ringt við at taka seg saman til at mála! Lady Once er ein nýggj máling, sum inniheldur 40% fleiri litevnir (pigment) enn vanligt. Tí er bert neyðugt at mála veggin eina ferð uttan at tað gongur út yvir úrslitið, sigur Profa.

Málingin hevur ein kremuttan tættleika, og ein serlig málirulla verður nýtt til at smyrja uppá við. Sjálvt um málingin hevur ein mattan glans, tolir hon at veggurin verður turkaður við einum vátum klúti, uttan at liturin fer av. Tað er nú freistandi at skifta lit á vegginum, tá hetta er so lætt við Lady Once, siga tey hjá Profa.

Tað nýggja, vakra Lady Once-litkorti ger í hvussu so er sítt til at freista við ikki minni enn 64 vælvaldum, bleytum, ljósum mótalitum. Kortið fæst ókeypis í Profa-handlinum.

Profa Farver

www.profa.dk
Profa á Hálsi tlf. 319220
á Tvøroyri 371081
í Saltangará 449149


# Sharon vann Barnaprixið í Havn

**Sharon Zachariassen av Argjum vann innleiðandi kappingina í Nósabarnaprix, sum var í Badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið**

NÓSABARNAPRIX
*Eirikur Lindenskov*

Sharon Zakariassen av Argjum, bleiv næsti vinnarin í Havn, sum um stutta tíð fer í upptøkustudio við James Olsen at taka upp fløguna »Nósabarnaprix 2002«.

Men hon er sjálvandi fyrst og fremst við í stóru finaluni í høllina á kambsdali tann 9. november um at gerast vinnari av »Nósabarnaprix 2002«.

Nógv fólk vóru í Badmintonhøllini leygarkvøldið, og tiltakið var eins og hini undanumførnini sera væleydnað.

– Øll børnini, sum luttóku, bæði sungu og dansaðu, sum høvdu tey fingið yrkishjálp, men tey, sum spurd vóru, søgdu at tey fyri tað mesta høvdu gjørt alt sjálvi, siga fyrireikararnir.

Tey hava m. a. fylgt gjølla við í sjónvarpinum, og síðani hava tey eftirgjørt »stevini«, men okkurt var heimagjørt, og onkur teirra gekk tó til kórvenjing.

Tann, sum var í Badmintonhøllini leygarkldið var ikki í iva um, at børnini dugdu sera væl at upptraðka.



*Sharon Zachariassen av Argjum vann undanumfarið í Nósabarnaprixnum í Havn leygarkvødlið, og hon verður teirra millum, sum fara at kappast í finaluni á Kambsdali 9. november*


Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways



Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2165,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 10/10 og 22/10 til 9/12 2002.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 30 dagar.



Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1479,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 9/12 2002.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 - Fax 34 10 01 - booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Arbeiðsvanlukka uttan fyri Vágatunnilin

**Fríggjamorgunin datt ein steinur av grótgarðinun, ið lagaður verður við tunnilsmunnan Vágamegin. Steinurin tók í ein mann, sum arbeiddi upp á garðin, og tók hann niður við sær. Steinurin vigar um eitt tons**

VANLUKKA
*Ingrid Bjarnastein*

Um níggju tíðina fríggjamorgunin kundi ein arbeiðsmaður, ið arbeiðir við at laga ein grótgarð við tunnilsmunnan á undirsjóvartunlinum, komið rættiliga illa fyri. Hann var tíbetur heppin, um hugsað verður um, hvussu illa kundi staðið til.

Talan er um ein grótgarð, sum verður lagaður. Hesin garður er um tveir metrar høgur. Maðurin stóð uppi í stiganum og arbeiddi, tá ein steinur datt niður. Steinurin vigaði um eitt tons. Tíbetur tók steinurin bara í mannin, ístaðin fyri at detta á hann. Maðurin datt úr stiganum, og hildið verður, at hann hevur brotið mjødnina. Tó visti politiið í Miðvági ikki rættiliga, hvussu var statt. Um talan er um brotna mjødn, so verður maðurin helst sendur niður til Danmarkar.



*Uttanfyri Vágatunnilin vágamegin datt ein steinur niður av einum grótgarði, sum verður lagaður. Steinurin vigar eitt tons, og tók í ein mann á veg niður. Tíbetur var skaðin ikki so álvarsligur, sum hann kundi verið*

*Savnsmynd*

# Eftir høvdinum niður á betonggólv

ARBEIÐSVANLUKKA
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið klokkan 20.30 fekk politiið í Runavík fráboðan um, at ein kvinna var dottin av eini maskinu á Viking Seafood á Strondum. Hetta var í sambandi við vasking. Tá málið varð kannað nærri, vísti tað seg, at hon var dottin av eini slisku, eftir høvdinum niður á betonggólv.

Politiið í Runavík upplýsir, at kvinnan er sloppin væl frá óhappinum. Sjúkrabilur og lækni kom á staðið, og kvinnan hevði fingið ilt í nakkan og ryggin, men hon hevur helst ikki meislað meira enn rygg og vøddar.

Kvinnan varð útskrivað av sjúkrahúsinum sunnudagin.

Leygarmorgunin varð ein tikin í Funningsfirði fyri at koyra fullur.

Annars verður sagt frá politinum í Runavík, at sera nógv fólk hava verið í býnum í Eysturoynni um vikuskiftið. Men tíbetur hevur ikki nógv álvarsamt verið á skránni.

# Bilførari sovnaður

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnumorgunin varð eitt lítið ferðsluóhapp við Hvítanesvegin-Vegin Langa í Havn. Bilførarin var sovnaður og koyrdi útav. Hann fekk onkrar smásnuddir, og varð tí koyrdur á skaðastovuna.

Annars hevur politiið í Havn tikið tríggjar mans fyri at hava koyrt ávirkaðir av rúsdrekka. Harumframt hava tríggir sovið rúsin av sær niðri í brummuni.

DJ-show var í Badmintonhøllini leygarkvøldið. Men hetta hevur verið eitt av teimum friðarligu. Onkur lítil fráboðan hevur verið. Millum annað var tað onkur, sum hevði fingið ov nógv niðurum, men heilt illa stóð ikki til hóast alt.

Leygardagin vóru tvey tikin í Kollafirði. Annar bilførarin koyrdi 115 km/t, meðan hin koyrdi 130 km/t.

Leygarnáttina hevði ein fingið eitt ølglas upp í andlitið. Ilt var komið ímillum tveir, og annar hevði smekkað ølglasið upp í andlitið á hinum, so hann skar seg frá nøsini yvir til annað eygað. Hetta verður tikið sum eitt harðskapsmál.

Sum heild letur politiið í Havn væl at vikuskiftinum.


TELEFONBÓKIN 2003

Seinasta freist at lata broytingar inn er hósdagin 7. november 2002

Í mars 2003 verður telefonbókin fyri ár 2003 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

Hvítu síður

Hósdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2003 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 620 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

Eykaupptøkur v.m.:
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummar, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 50,- kr. (uttan mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

Búmerki:
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

Gulu síður

Týsdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at boða frá av nýggjum, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

Prísir:
(A)+(D) Standardlýsing ........ kr. 650,00
(B) Stórt navn ........ kr. 50,00
(C) Innramming ........ kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 618 í Telefonbókini 2002)

Litlýsingar:
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 619 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til:
Telefonlagið, Føroya Tele, att. Martin Brødersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum
Postboks 27 - 110 Tórshavn - tel 30 30 30 - fax 30 30 31
www.nummar.fo - info@nummar.fo
www.gulu.fo - info@gulu.fo